# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Arna Samuelsen, Klaksvík



Tann 13. juli andaðist Arni Samuelsen, Klaksvík 72 ára gamal. Arni var sonur Samuel Jacob Juel Samuelsen, ættaður úr Lorvík og vanliga nevndur Sámal í Lorvík og Oluffu, fødd Heinesen av Viðareiði.

Oluffa og Sámal í Lorvík bygdu sær heim á Vágsheygnum, beint við fótbóltsvøllin; har sleit Arne sínar barnaskógvar. Børnini hjá Oluffu og Sámal vóru átta í tali. Arni var tvíburður við Otto. Teir vórðu bornir í heim 21. juni 1932. Í 1963 giftist Arni við Poulinu Samuelsen úr Haldarsvík. Tey búsettust á Heygavegnum í Klaksvík og fingu døtrarnar Lisbeth og Birgit.

Tá Arni valdi sær lívsyrki, gekk hann í faðirsins fótaspor; hann lærdi húsasmíð hjá faðir sínum og fór seinni til Danmarkar at útbúgva seg til byggifrøðing. Eitt tað størsta og mest søguliga verkið, ið stendur eftir teir báðar, feðgarnar Arna og Sámal í Lorvík, er uttan iva bóndahúsini í Múla við tilhoyrandi úthúsum, sum vórðu niðurtikin í Múla og bygd uppaftur á »Frilandsmuseet« í Danmark, við júst sama sniði, sum tey høvdu í Múla. Hetta var í fyrru helvt av sekstiárunum.

Tá hin gamli legði frá sær, helt Arni fram við egnum virkið; hann arbeiddi sum byggifrøðingur og húsasmiðjur. Umframt hetta hevði hann eisini fleiri álitisstørv. Millum annað hevði hann søluna hjá Happadráttinum í Klaksvík um hendi í nógv ár. Í eitt langt áramál var hann limur í Líkningarráðnum. Líkningarráð Føroya var samansett av trimum limum. Sambært lógini skuldu ein vera byggikønur, ein skuldi vera lógarkønur og ein skuldi vera roknskaparkønur. Arni varð valdur sum tann byggikøni.

Arni Samuelsen var eldhugaður javnaðarmaður. Hann røkti fleiri álitisstørv í javnaðarflokkinum. Í fleiri ár var hann nevndarlimur í Norðoya Javnaðarfelag. Í nøkur ár var hann eisini formaður í felagnum. Hann varð eisini valdur at umboða Norðoya Javnaðarfelag í floksleiðsluni hjá Føroya Javnaðarflokki. Sum tann álitismaður hann var, møtti hann trúliga upp á teimum fundum, har hann var valdur sum umboð. Og hann var so at siga á hvørjum einasta limafundi í Norðoya Javnaðarfelag. Eitt tað seinasta stóra arbeiði, sum Arni hevði ábyrgdina av, var at seta í stand tann gamla handilin hjá Óla Gaard, ið upprunaliga var handil hjá Óla í Skúla, bygdur í 1904. Tey sum ganga eftir Klaksvíksvegnum og framvið hesum bygninginum, gerast skjótt varug við, at hegnismaður var hann. Eitt sera snotuligt og væl úr hondum greitt arbeiði. Í nógv ár kemur tað at standa sum ein minnisvarði um hegnismannin Arna hjá Sámali í Lorvík.

Eins og brøðurnir Otto og Eiler, var Arni virkin í Klaksvíkar Hornorkestri. So vítt eg veit, var Sámal í Lorvík ein av teimum, sum í 1950 tók stig til at stovna Klaksvíkar Hornorkestur. Synir hansara komu allir tríggir at spæla við í orkestrinum. Fyrst Arni og Otto og seinni eisini tann yngsti bróðurin Eiler.

Arni var ein sera fryntligur og prátingarsamður maður. Hann dugdi eisini at vera skemtiligur tá tað var hóskandi. Átrúnaðarliga hoyrdi Arni til brøðrasamkomuna. Í politikki var hann javnaðarmaður. Flokkinum var hann ein sera trúgvur og hollur stuðul.

Vit sum kenda Arna, mistu nógv, tá hann flutti hiðani av fold, men størstur var missurin hjá tykkum, Poulinu, Lisbeth og Birgit. Harrin troysti og styrki tykkum í stóru sorgini.

Við hesum orðum lýsa vit frið yvir minnið um Arna Samuelsen.

Klaksvík, 2. jóladag 2004
**Vilhelm Johannesen**

Fyri 25 árum síðan:

## Stýrimansprógv í desember 1979



Í desember 1979 fingur níggju stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla. Teir vóru: Jacob D. Lagfoss, Sandvík, Heini H. Guttesen, Sørvágur, Anfinnur Gærdum, Strendur, Julian M. Juul, Tórshavn, Jørgen Kreisø, Gjógv, Jón Simonsen, Sandavágur, Kaj Tausen,Vágur, Oddmar H. Hansen, Tórshavn, Eyðfinnur Olsen, Tórshavn, og Dione Nolsøe, Sørvágur. (Raðfylgjan er ikki tann sama sum á myndini)

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1980*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður mín og góði pápi, abbi, verfaðir og langabbi okkara

**Hákun Magnussen**

Tórshavn

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 27. desember, 77 ára gamal.

Bønarhald verður í kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin 29. desember kl. 14.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 30. desember kl. 13.

*Fyri tey avvarðandi*

**Malla**

**Dagurin**

**29. desember. Nóa.** Dagur til minnis um mannin, sum gjørdi ørkina (1. Mós. 6-9)